**Ulla Svarrer Wang**[1]

# Hvør fær rættin til Rockall Háslættan?

***Føroyskt Úrtak***
*Bæði Stórabretland, Írland, Føroyar-Danmark og Ísland hava sett fram landgrunskrøv á Rockall Háslættanum í Norðuratlantshavi. Stórabretland og Írland settu fram landgrunskrøv á Rockall Háslættanum vestan fyri skotsku og írsku strendurnar í 1974, og hava síðani tá boðað frá landgrunskrøvum, sum røkka til vestara jaðaran av Rockall Háslættanum. Hesi bæði londini samdust í 1988 um landgrunsmarkið landanna millum í hesum øki. Føroyar-Danmark og Ísland boðaðu frá teirra landgrunskrøvum í 1985, og hesi krøv røkka eisini til Rockall Háslættan og umskarast við bretsku og írsku krøvini. Nú eru tvey meginøki á Rockall Háslættanum har ósemja er um landgrunsrættindi millum (i) Stórabretland, Føroyar-Danmark og Ísland, og (ii) Írland, Føroyar-Danmark og Ísland.*

*Ósemjan á Rockall Háslættanum kemst av landgrunskrøvum, sum fara út um 200 fjórðingar frá grundlinjunum fyri landleiðirnar hjá teimum fýra pørtunum. Krøvini eru grundað á eitt natúrligt framhald av landøkinum hjá strandalandinum til útjaðaran á meginlandsrondini, sum ásett er í grein 76 í Havrættarsáttmálanum hjá Sameindu Tjóðum frá 1982 (UNCLOS).*

*Møguliga semjast teir fýra partarnir um landgrunsmarkið. Men marknaseting av landgrunni hevur ofta ført til rættarmál, og henda ósemjan verður møguliga eisini løgd fyri Altjóða Dómstólin í Haag ella ein gerðarrætt. Partarnir mugu tá leggja fram jarðfrøðilig prógv fyri natúrliga*

[1] MSc Engineering (Aalborg), LL.M. International Law (Napier University, Edinburgh). Av misgávu kom føroyska úrtakið ikki við í greinina 1 FLR (2001) 113.

*framhaldinum av landgrunninum út um 200 fjórðingar. Nevndin fyri áseting av landgrunsmarki, sum er sett av UNCLOS, skal gera tilmæli til strandalond um landgrunskrøv uttan fyri 200 fjórðingar. Um einki av krøvunum hjá pørtunum verður góðkent, er økið á Rockall Háslættanum handan løgdømi hjá nøkrum landi og verður lýst djúpur havbotnur. Tá er økið og náttúrurikidømið í økinum felags ogn hjá mannaættini og kemur undir yvirvaldsrættin hjá Altjóða Havbotnsmyndugleikanum.*